SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Dagfesting: 11-11-2024

# UPPSLAG

## Burturbeining av olju frá skipum 15 metrar og longri

Sambært kunngerð nr. 124 frá 25. november 2005 og kapittul XXI í Fráboðan frá Sjóvinnustýrinum B, D og E og sambært Fylgisskjali I til altjóða MARPOL sáttmálan

Olja og oljudálkaður sjógvur ella vatn, sum tað sambært niðanfyri nevndu talvu ikki er loyvt at koyra í havið, skal goymast umborð og avhendast til móttøkuskipan á landi.

| Burturbeining á føroyskum sjóumveldi<br>(12 fjórðingar úr grundlinjuni)<br><br>og í Suðurpólska økinum | Burturbeining uttan fyri føroyskt sjóumveldi<br>(meira enn 12 fjórðingar úr grundlinjuni) |
|---|---|
| Bannað | Burturbeining av olju og oljudálkaðum sjógvi ella vatni úr maskinrúmi er bannað, uttan so at allar niðanfyri nevndu treytir eru samstundis loknar:<br><br>1. Skipið siglir<br>2. Nýtt verður góðkend reinsi- og eftirlitsútgerð ella onnur góðkend útgerð<br>3. Oljuinnihaldið í blandingini, uttan tynning er minni enn 15 ppm (parts per million)<br><br>Viðm.: Omanfyri nevndu ásetingar er høvuðsregla og kemur skipið í fremmanda havn ella fremmant sjóøki, er týdningarmikið at kenna reglurnar út í æsir um oljuútlát, sambært kapittul XXI í Fráboðan B, D og E. |